# Navigatørar ógvuliga mobilir

Fíggjar- og búskaparkreppa merkja orðskiftið nógv um dagarnar. Fiski-og sjóvinna hava ígjøgnum allar tíðir verið noyddar at tillaga seg til skiftandi umstøður. Á aðalfundi í Føroya Skipara-og Navigatørfelag segði formaðurin, at limir felagsins hava ein stóran fyrimun fram um mong onnur. – Okkara limir eru nevniliga rættiliga mobilir og kunnu lættliga søkja sær hýru í øðrum londum og soleiðis forsyrgja sær og sínum, hóast vinnumøguleikarnir eru skerdir her heima. Hann segði, at hesir limir felagsins soleiðis føra stórar peningaupphæddir til okkara samfelag. - FSN sær tað eisini sum sína uppgávu at virka fyri áhugamálunum hjá teimum, sum sigla í øðrum londum. Hann vísti á, at føroysk fiskivinna hevur stórar avbjóðingar fyri framman. - Vit kunnu óiva øll læra av teimum mistøkum, sum gjørd eru. Heldur enn at geva nøkrum skuldina, vil FSN heldur líta frameftir og viðvirka til loysnir og frambrot, sum gagna okkum øllum, segði Eyðstein Djurhuus.



*Borðhaldið við 85 ára føðingardagin hjá Akseli Hansen var í felagshølunum hjá Føroya Ríðingarfelag í Havnardali*

*Mynd: Jan Müller*

- Nú veit eg ikki, hvussu leingi okkum unnist at liva, tí eg vænti, at fleiri av okkum hava bóltað rút nógvar ferðir, áðrenn vit eru 85. Men takksemi til Aksel og hansara fara vit altíð at føla. Tí, uttan mun til, hvat vit annars fáast við í lívinum, so tørvar okkum nakað at liva av, og okkum tørvar eisini ein hellubotn at standa á, sum gevur okkum ein búskap, ið hvílir á tryggari grund.

Hann segði, at tað, sum hevur eyðkent hetta fólkaslagið, sum hann tók til, er, at teir lótu seg ikki velta av einum broti ella báðum tveimum.

- Teir mannaðu seg uppaftur hvørja ferð, og enn situr Aksel Hansen so trúliga í sessinum, segði hann.

## Veldugt lívsverk

Í endanum av røðu síni bað Óli Breckmann fólk um at reisa seg og rópa eitt trífalt hurrá fyri tí manni og familju hansara, sum hevur verið við til at økt fólkatalið í høvuðsstaðarkommununi úr umleið 3.000 upp í eini 20.000.

- Aksel hevur verið við til at økt og føtt nógvar føroyingar – ja, úr 25.000 fólkum upp í næstan 50.000. Vit skulu bara vóna, at tað vera nógv fólk, sum kunnu fylgja í Akselsa fótasporum og kunnu gera honum velduga lívsverkið eftir, segði Óli Breckmann.



*Aksel Hansen er serliga kendur sum stjóri á Bacalao í Havn, og hann hevur eisini í fleiri ár verið reiðari. Gamla felagið Kimbil er soleiðis til enn tann dag í dag*


Vit elska góð tíðindi

About 80 % of businesses are expected to be using SharePoint by 2010, according to Gartner Research

Okkara kundar hava valt SharePoint framum aðrar skipanir innan:

- Uppgávustýring
- Skjalasavn
- Skjalahandfaring
- Dátu innsavning
- Workflow
- Intranet
- Extranet
- Internet/heimasíðu

Hevur tú fingið røttu ráðgevingina?

Stutt sagt so elska vit at loysa uppgávur í SharePoint!

intra

intra@intra.fo
+298 599 123

**Intra** er leiðandi innan Microsoft SharePoint við kundum á privata og almenna økinum, bæði í Føroyum og í Danmark. Vit hava hollar royndir innan Microsoft, .NET, SharePoint og Office 2007.